LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

Skálavíkar Kommuna
Gerðisvegur 13
220 Skálavík

Tórshavn, tann 29. februar 2024
J. nr.: 23/21055-7
Viðgjørt: CHD

**Viðv. klagu um borgarstjóran í Skálavíkar kommunu**
Kommunala eftirlitið í Løgmálaráðnum fekk tann 25. oktobur 2023 klagu frá kommunustýrislimi í Skálavíkar kommunu um atferðina hjá borgarstjóranum.

**Niðurstøða**

Borgarstjórin hevði heimild sambært § 10 at biðja klagaran, sum hevði mett seg ógegnigan í máli nr. 01 á skrá til kommunustýrisfundin 23. oktobur 2023, og sum var møttur upp til fundin sum vanligur borgari og áhoyrari, um at fara út úr hølinum, tá ið ítøkiliga málið var til viðgerðar.

**Lógargrundarlag**

- Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 22. mai 2023 *(kommunustýrislógin)*
- Løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg *(fyrisitingarlógin)*

**Um málið**
Klagarin, ið er kommunustýrislimur í Skálavíkar kommunu, klagar um borgarstjóran fyri at hava tvingað seg av kommunustýrisfundinum, ið var tann 23. oktobur 2023. Í klaguni verður upplýst, at klagarin metti seg ógegnigan í einum máli, ið var á skrá, og tí bað varalim um at taka sæti fyri seg. Klagarin upplýsir, at hann sjálvur møtti til fundin, men bert sum áhoyrari ella vanligur borgari. Klagarin metti seg hava rætt til hetta, og at borgarstjórin tí mistók seg við at tvinga hann av fundinum og út úr hølinum, tá ið málið var til viðgerðar.

Viðmerkt er eisini í klaguni, at klagarin metti tað vera átaluvert, at borgarstjórin kom við framman undan fyrireikaðum og dagfestum svarum uppá mótmælir til ein kommunustýrisfund, har hesi vóru á skrá til viðgerð hjá kommunustýrinum.

**Málsgongd**
Tann 3. novembur 2023 sendi Kommunala eftirlitið teldupost til Skálavíkar kommunu og bað kommununa um at greiða frá málinum og senda øll skjøl í málinum, m.a. avrit av gerðabók fyri ítøkiliga kommunustýrisfundin tann 23. oktobur 2023.

Tann 3. novembur 2023 kunnaði Kommunala eftirlitið klagaran um, at Skálavíkar kommuna var biðin um at lata eina frágreiðing og um at senda øll skjøl í málinum við freist tann 20. novembur 2023.

Tann 8. novembur 2023 sendi Skálavíkar kommuna Kommunala eftirlitinum skjølini í málinum og soljóðandi frágreiðing:

> "...
>
> Í sambandi við, at biðið verður um øll skjøl, so gongur kommunan út frá, at talan er um mál nr. 01 á skrá, sum var um viðgerð av broytingum í byggisamtyktini, har fleiri mótmæli vóru innkomin.
>
> ...
>
> Viðmerkjast skal, at talan er um fund, har klagarin frammanundan hevði givið boð um, at hann metti seg ógegnigan í mun til málið um mótmæli móti byggisamtyktini, sum var mál nr. 01 á skrá, og har viðkomandi tí hevði biðið varalim møta fyri seg til viðgerð av tí málinum, sí avrit av boðum um hetta. Hetta var eftir, at borgarstjórin hevði gjørt vart við gegnisspurningin í sambandi við, at fundarskráin fór út 18. oktober 2023, sí hjálagt avrit av tí teldupostinum til bygdaráðslimirnar.
>
> Sum A greiðir frá, so møtti varalimur, men klagarin møtti eisini og sat á áhoyraraplássinum. Hetta var ikki mett rætt, og borgarstjórin bað tí A fara av fundi og úr hølunum, tá hann var ógegnigur og hevði biðið varalim møta í sambandi við málið. Hesum var klagarin ikki samdur í, og tí nágreinaði borgarstjórin, at hann átti ikki at vera til staðar undir viðgerðini – heldur ikki sum áhoyrari.
>
> Kommununi kunnugt er tað galdandi sambært fyrisitingarlógini, at ert tú ógegnigur í mun til ávíst mál, so mást tú hvørki taka avgerð, vera við til at taka avgerð ella á annan hátt vera við í viðgerðini av júst tí málinum. Eisini er vanlig rættarmeginregla galdandi innan fyrisiting og kommunufyrisiting um, at ógegnigur limur eigur at fara úr fundarhølunum, tá tað málið er til viðgerðar. Hetta er eisini, hóast talan er um almennan bygdarráðsfund. Hetta sæst t.d. í donsku kommenteraðu kommunustýrislógini, normalforretningsordenen § 8, stk. 1, við notu 2, sum er løgd við í avriti.
>
> ...
>
> Í mun til, at bygdarráðsformaðurin og umsitingin hevði fyrireikað uppskot til svarskriv til innkomnu mótmælini, sum kundu verða viðgjørd á fundinum, so verður ikki mett, at hetta er skeivt ella átaluvert. Sum tað framgongur av gerðabókini, var talan um uppskot, og hesi blivu eisini viðgjørd í sambandi við mótmælini. Síðan vóru 4 av 5 limum fyri at svara borgarunum við støði í uppskotunum og vísandi til grundgevingarnar har. Onki var sostatt í vegin fyri, at svarskrivini blivu broytt, dagfest øðrvísi, ella at undirtøka als ikki var fyri teimum, um bygdarráðið hevði ta støðuna.
>
> ..."

Tann 5. februar 2024 spurdi klagarin um, hvussu bleiv við hansara máli.

Tann 6. februar 2024 svaraði Kommunala eftirlitið klagaranum, at málið var til viðgerðar og kundi væntast avgreitt í vikuni ella komandi viku.

**Viðmerkingar hjá Kommunala eftirlitinum**
Klagari upplýsir, at hann hevði boðað frá, at hann var ógegnigur í einum máli, ið var til viðgerðar á kommunustýrisfundinum tann 23. oktobur 2023. Tó metti hann seg kunna luttaka á fundinum sum vanligur borgari og áhoyrari.

Sambært viðmerkingunum til § 10, stk. 2 í kommunustýrislógini er rættarfylgjan av ógegni, at viðkomandi kommunustýrislimur skal fara av fundinum, tá ið tað málið, sum hann er ógegnigur í, verður viðgjørt.

Í ítøkiliga málinum er ivamál um, hvørt ógegnigur kommunustýrislimur kann sita sum áhoyrari í sama høli, har málið, hann er ógegnigur í, verður viðgjørt.

§ 10 í kommunustýrislógini fevnir um tað serliga ella ávísa gegnið. Umráðandi er, um kommunustýrislimur hevur ein serligan áhuga í einum ávísum máli samanber við § 3 í fyrisitingarlógini.

§ 3, stk. 3 í fyristingarlógini ásetur:

> "Hann, sum er ógegnigur í einum máli, má ikki taka avgerð, vera við til at taka avgerð ella á annan hátt vera við í viðgerðini av málinum."

Ásetingin, at fyrisitari ikki á annan hátt má vera við í viðgerðini av málinum, verður ikki nágreinað í viðmerkingunum til § 10 í kommunustýrislógini.

Kommunustýrislógin er í høvuðsheitum ein føroysk útgáva av donsku kommunustýrislógini. Tá ið talan er rættargrundreglur, sum eitt nú reglan um ógegni, kunnu viðmerkingarnar til donsku kommunustýrislógina nýtast sum ískoyti til tulkingargrundarlag.

Sambært donsku viðmerkingunum til ásetingina um ógegni[1], er rættarfylgjan av ógegni, at ógegnigur kommunustýrislimur hvørki kann luttaka í viðgerðini av málinum ella vera hjástaddur sum áhoyrari, tá ið málið verður viðgjørt. Eisini verður viðmerkt, at viðkomandi ógegnigur kommunustýrislimur skal fara út úr hølinum, meðan málið verður viðgjørt.

Kommunala eftirlitið metir, at viðmerkingarnar greitt greina rættarstøðuna, soleiðis, at sjálvt hetta, at kommunustýrislimur er til staðar á fundi, kann síggjast sum eina ávirkan á málsviðgerðina.

---

[1] Lov om kommunernes styrelse med kommentarer – Normalforretningsordenen, af Hans B. Thomsen, Pernille Christensen og Lise Brandi-Hansen, Jurist- og Økonomforbundets Forlag 2010, s. 137 note 5.

Viðvíkjandi viðmerkingini frá klagaranum um, at hann helt tað vera átaluvert, at borgarstjórin kom við framman undan fyrireikaðum og dagfestum svørum til innkomnu mótmælini av eini broyting í byggisamtyktini, sigur borgarstjórin, at hann helt onki forða fyri, at svarskrivini vórðu broytt og dagfest øðrvísi, um undirtøka ikki var fyri teimum.

Kommunala eftirlitið skal vísa á, at endamálið við eini viðgerð í kommunustýrinum er, at kommunustýrið fær høvi til at umrøða málið og síðan koma til eina niðurstøðu í málinum. Kommunala umsitingin kann síðani sambært niðurstøðuni gera eitt svarskriv, ið inniheldur grundgevingarnar fyri støðutøkuna hjá kommunustýrinum.

Kommunala eftirlitið heldur, at tað ikki vísir góðan fyrisitingarsið, at umsitingin til kommunustýrisfundir ger skjøl, sum eru dagfest og innihalda eitt smíðað svar frá kommunustýrinum, áðrenn kommunustýrið hevur umrøtt og tikið støðu til málið, tí talan ikki er um eitt standard mál. Kommunala eftirlitið metir, at hetta kann órógva ta sjálvstøðugu metingina, ið hvør einstakur kommunustýrislimur skal gera um málið.

**Niðurstøða**
Kommunala eftirlitið metir, vísandi til gjøgnumgongdina omanfyri, at borgarstjórin hevði heimild sambært § 10 at biðja klagaran, sum hevði mett seg ógegnigan í máli nr. 01 á skrá til kommunustýrisfundin 23. oktobur 2023, og sum var møttur upp til fundin sum vanligur borgari og áhoyrari, um at fara út úr hølinum, tá ið ítøkiliga málið var til viðgerðar.

Vegna Løgmálaráðið

Christina Holm Davidsen

*Fulltrúi*